# Sosialurin

Nr. 132 • hósdagur • 14. juli 2005 • 79. árgangur • Kr. 13,00

www.sosialurin.fo



REYNI RENTAL

TOYOTA



Leiga bil frá Reyni Rental

- Ein Yaris í eitt vikuskifti fyri kr. 890,-

Tel. 353040
www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F




## Ana Johnsson til Klaksvíkar

Síða 2



## Stórt Vestan-stevnublað

Síða 19-34



## Jógvan vann gull

Ítróttur síða 12-18

Klaksvíkingar róðu til Hetlands:

# So nær við men kortini so langt frá



*Símun Esmar Vágsá, John Erik Frederiksberg, Livar Nysted og Fróði Waag vóru teir fýra, sum ætlaðu at gera tað bragd at rógva úr Føroyum til Hetlands. Tað mundi eydnast, men tá ið teir sóu land, máttu teir gevast*

**Teir fýra menninir, sum ætlaðu at rógva úr Føroyum til Hetlands, komu so langt, at teir sóu land, men so máttu teir leggja árarnar inn**

RÓÐRARBRAGD


*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*


Teir komu so langt, at teir sóu land. Men so máttu teir leggja árarnar inn.

Tað hevur uttan iva verið við ringum tannabiti, at teir fýra menninir, sum høvdu sett sær fyri at rógva úr Føroyum til Hetlands, máttu geva skarvin yvir týsdagin.

Eftir at hava róð í næstan eina heila viku, vóru teir komnir so langt týsdagin, at teir sóu land, men á miðdegi máttu teir leggja árarnar inn, tí veðrið varð ov ringt.

Kristian Eli Zachariasen hevur havt nógv samskifti við menninar. Hann sigur, at teir fóru úr Klaksvík seinasta mikumorgun klokkan sjey við áttamannafarinum, Havrenningi, sum er gamla Nevið Reyða.

Teir høvdu sett sær fyri at rógva heilt til Hetlands.

Teir vistu frammanundan, at hetta fór at verða ein tungur róður, Men róðurin gjørdust enn tyngri enn teir høvdu vónað, tí teir høvdu mótvind allan vegin.

– Teir komu so langt, at teir sóu land, tá ið teir máttu gevast. Tá vóru teir 18 fjórðingar úr landi. Men hann var 15 metrar um sekundið ímóti og stór alda, so tað var ikki ráðiligt at halda fram.

Tískil kom ein bjargingarbátur út eftir teimum og sleipaði teir til lands.

– Hóast teir máttu gevast, hevur hetta verið eitt ódnartak. Teir hava róð í seks dagar og fingið lítlan og ongan svøvn. Onkur av teimum svav bara einar 10 tímar á allari ferðini og hevði ongan blund fingið trý tey seinastu samdøgurini. Bekksár hava eisini plágað teir, so tað hevur verið hart.

Annars vóru teir hampiliga væl fyri.

– Teir vóru annars hampiliga væl fyri tá ið teir fóru og teir vóru væl útgjørdir. Teir róðu í bjargingarvestum og høvdu hvør sína yvirlivilsisdrakt, umframt bjargingarbát. Harafturat høvdu teir VHF, neyðsendara, plottara, GPS´ara, bluss og neyðrakettir við sær.


KAMPANJUAVSLÁTTUR
UPP TIL
45.000 KR

VOLVO
FOR LIFE

VR
BILAR



BUSSKOYRING & KOYRISKÚLI
til persónbil & motorsúkklu

Faroe Islands Bus Line
v/ Mogens Wraae
Óluvugøta 10, Tórshavn
tel 31 34 20
fax 31 34 20
far 21 34 20

... tú fært tað munandi betri



við HTH-KØKUM

Køksmiðstøðin
Á Hálsi · FO-100 Tórshavn
tel 31 49 49 · fax 31 13 30
www.hth-koksmidstodin.fo



Klæðir til ta litlu kvinnuna

Støddir:
32-46 / XS-XL

Dj. í Geil gøta 36
100 Tórshavn
Tlf. 31 98 95
Opið: Frí. 12-19
& Ley. 10-14

Telefonin svarar eisini mánadag-hósdag kl. 16-18



ALT BARNINUM TØRVAR

B&B

Baby & Barnaútgerð · Niels Finsensgøta 18
100 Tórshavn · Tel. 315 101

AUTO
311234



Dag og nátt - Alt døgnið

AUTO
TEL 311234
IF YOU WANT A TAXI